# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum hjálptu okkum, góvu okkum gávur og á ymsan hátt sýndu okkum samkenslu, tá kæri pápi okkara

**Tommy Vinther Kjærbo**

so brádliga og óvæntað varð tikin frá okkum. Takk fyri tey góðu orð, ið søgd vórðu í kapellinum, takk fyri góðan tónleik og góðan sang.

**Anita, Tummas, Bjartur og Bárður**

†

Tað verður kunngjørt fyri ætt og vinum, at kæri pápi, beiggi, svágur og mammubeiggi okkara

**Lauritz Debes**
Tórshavn

andaðist fríggjadagin, 10. oktober á Landssjúkrahúsinum, 53 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd í útvarpinum.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jannet og Majbritt**

## Minningarorð um ommu mína

# Súsanna Malena Guttesen

### vanliga nevnd Lena, ættað av Norðskála

**Fødd 09.10.1992 og andaðist 12.08.2008**



Týskvøldið 12. august 2008 ringdi mamma til mín, og segði mær at tú ikki vart ímillum okkum longur.

Tað vóru tung boð, sum ikki vóru løtt at hoyra fyri meg. Vit hava altíð verið nær, kanska ikki so nógv síðan eg flutti úr Havnini, men eg kom av og á forbí at vitja teg uppi hjá Eiler gubba og so eisini úti á heiminum í Vallalíð, har tú búði tað seinasta árið.

Tú vart altíð í góðum lag, eisini seinast eg vitjaði teg. Eg sá at tú vart nógv eld, men eg hugsaði ikki at hetta var okkara seinasta løta saman. Nógv góð minnir havi eg um teg og eg eri glað fyri, at tú altíð hevur verið har fyri okkum øll.

Tú vart ófør at binda, og tú bant øllum ommubørnunum hosur og skóleistar, so at eingin skuldi mangla nakað upp á føturnar.

Tú vaks upp við Norðskála saman við foreldrunum Jóhannus Johannesen, ættaður úr Tjørnuvík, og Elsa Johannesen, fødd Joensen, frá Norðskála. Tú hevði 6 systkin, fimm brøður og eina systur, sum á ungum árum giftist til Noreg.

Tú vart altíð hjálpsom og arbeiddi nógv, og sum ung fór tú til Havnar at tæna. Seinni giftist tú við Hans Erling Guttesen, ættaður undir Ryggi í Havn, og saman fingu tit sjey dreingir, har av fimm liva eftir í dag. Tit bygdu hús við Stoffalág.

Í 1981 misti tú mann tín í einari fersluvanlukku og mátti eisini fara ígjøgnum ta sorg at missa tveir av tínum synum á ein tragiskan hátt. Men tú vart sterk sum altíð og vísti okkum øllum, hvussu ein familja stendur saman í svárum tíðum. Tú hugsaði altíð um hini, og man fór aldrin svangur ella tystur avstað, tá man kom á gátt hjá tær.

Sum smágenta vaks eg upp heima hjá tær í Skúlagøtu. Har búðu vit í tvey ár, árenn vit fluttu niðan á Berjabrekku. Har var altíð nógv fólk inni og lukturin av køku og døgurðamati var ikki ókendur. Tú syrgdi altíð fyri, at øll fingu nokk og mangan, tá i vit ikki fingu endarnar at røkka saman, komst tú við eini hjálpandi hond. Tá mamma var sjúk, var tú eisini har fyri okkum, og eg kann ikki gloyma jólini vit samlaðust hjá tær, og tú borðreiddi fyri familjuni, ræst kjøt og súpan.

Summarferiurnar við Norðskála eru mangar í tali, har vit gingu niðri í fjøruni og heintaðu goggur, og tá vit fóru á flot við bátinum Lena, sum eitur eftir tær. Nógv fekst tú burturúr veiðuni, sum vit høvdu fingið og vit plagdu at grína eftir, tá ið tú stóð og klamsaði frikadellur, og hvussu alt gekk við rúkandi fer. Hvørt summar vart tú við í hoygging á trøðni við Sundsvegin í Havn og í Norðskála. Tað bar ikki til at taka teg aftur, og einki hoyggj var borið inn í hoyggjhúsið fyrr enn omma hevði sagt gott fyri tí. Tú vart álitið.

Eg plagdi at spyrja teg um gamlar dagar, tá tú vart lítil, og tú plagdi at fortelja mær nógv spennandi, um hvussu ta var at vaksa upp tá í tíðini og hvussu glað tit vóru fyri tað, tit fingu burturúr.

Stórur er saknurin, men eg fari altíð at minnast alt tað góða, sum tú hevur gjørt fyri meg. Tú hevur verið ein ótrúliga góð omma og verið har fyri meg sum ein mamma. Eitt er púra vist og tað er, at tú verður nógv saknað. Nú ert tú farin til Jesus pápa at bíða, til vit øll koma at samlast aftur ein dag.

Hvíl í friði omma, eg elski teg.

**Marjun Guttesen,**
**ommudótturin**

# VIÐMERKINGAR

## Búskaparprofetar og fantastar



REIDAR NÓNFJALL

Búskaparstøðan, sum føroyingar liva við í løtuni, er rættuliga kaotisk og panisk við útvekslan av nógvari informatión, vitan, forsagnir og meiningar. Endamálið er væl alla tíðina at verða sakligur og realistiskur, soleiðis at røttu avgerðirnar kunnu takast. Onkur velur at gita seg til eitthvørt – vegna tað, at kenslurnar eru ov nógv í kók.

Sagt verður m.a., at búskaparfrøðingar (nevndir búskaparprofetar) og onnur, sum ráðgeva í løtuni, muga ansa eftir, tí tey kunnu tosa eina kreppu til veruleika, og onkur er illur, tí tey, sum úttala seg ikki hava grundarlag fyri at siga tað, sum tey siga. Fortreytirnar fyri at siga tað, sum nøkur siga, kunnu eisini verða ymiskar og geva ymiskar niðurstøður og boðskapir. Trupulleikin er, at vit hava ongan fasitlista at sláa upp í, nakrar meiningar eru rættari enn aðrar, og ongin veit fullkomuliga, hvar vit lenda (nakrir aktørar eru í fríum falli). Men rætt er, at vit skulu ansa eftir, hvat vit siga og argumentera væl – eins og við øllum vit takast við.

Tey, sum eru serliga kritisk yvirfyri teimum, sum siga, hvat er gjørt skeivt og sum royna at spáa um, hvat fer at henda o.a., eru sjálvandi tey, sum eru í vanda fyri missa stórt og ongantíð koma fyri seg aftur fíggjarliga.

Tað er kortini upp á tíðina, at fólk, sum hava eina aðra meining ella hava verið og eru kritisk yvirfyri førda búskaparpolitikkinum hjá landinum, kommununum o.a. sleppa til orðanna. Politisku og vinnuligu fantastarnir og spekulantarnir hava havt frítt spæl at koma við ábyrgdarleysum loysnum og ætlanum, sum onki realbúskaparligt hald eru í – vælstandurin er bjóðaður okkum umvegis lántøku, lønarhækkingar og ivasamt íløguvirksemi. Hesar handlingar eru framdar uttan realbúskaparligt grundarlag, tvs, vinnan ella landið eru ikki vorðin meira effektiv og produktiv seinastu 5 árini – tvørturímóti.

Tí skulu tey, sum hava disponerað ábyrgdarleyst seinastu árini, eisini góðtaka at verða hart kritiserað og skulu eisini standa til svars fyri sínum skilaleysu handlingum.

Hví hava fantastarnir og spekulatarnir í Føroyum ikki ansað eftir við teirra handlingum og virksemi?